# Vest Pack góðkenning til framleiðslu og sølu

*Vest Pack hevði fríggjadagin móttøku í samband við, at virkið hevur fingið altjóða ISO 9002 góðkenning*



*Andras Joensen, Norsk Veritas í Føroyum, Áki Olsen, góðskuleiðari og stjórin á Vest Pack, Jóan Magnus Olsen.*

**Mynd: Jens Kristian Vang**

DAGFINN OLSEN

Fríggjadagin var almenn móttøka á Vest Pack í Vestmanna í samband við, at virkið hevur fingið ISO 9002 góðkenning.

Á Vest Pack hava tey leingi arbeitt við at góðskutryggja vørurnar og nú hava tey fingið ISO 9002 góðkenning til bæði sølu og framleiðslu av pakkitilfari.

P/F Vest Pack varð stovnað í 1994 og tók tá yvir virksemið hjá P/F Tór Plast, sum byrjaði Plastframleiðslu í 1977.

Áki Olsen sigur, at krøv verða sett til t.d. flakavirki, sum Vest Pack framleiðir til, men ikki er heilt greitt, hvørji krøvini eru til tierra, sum lata til flakavirkini eru. Tí vil Vest Pack her vera eitt stig frammanfyri.

- Vit leggja fastar mannagongdir við hesi altjóða góðkenningini. Vit stýra sølu og keypi og øllum virksemi á virkinum. Eisini er ábyrgdin staðfest og býtt út á ymsu starvsfólkini, sigur Áki Olsen.



Sostatt kann virkið nú í størri mun fylgja framleiðsluni og harvið náa best best møguligu úrslitini, bæði fíggjarliga, innan góðsku og viðskiftanøgdsemi.

- Vit eru eitt framleiðsluvirki og sjálvsagt hendir ymiskt, sum ikki skal henda. Men hetta verður tikið upp, so trupulleikin verður loystur. Soleiðis fara útreiðslurnar eisini niður, tá slíkt ikki hendir aftur ella ein veit, hvat er galið, sigur Áki Olsen, men dylir ikki, at samstundis er nakað av reklamu í góðkenningini.

**Árlig kanning**

Tað er Norsk Veritas, sum kannar viðurskiftini í samband við ISO 9002 góðkenningina. Fyrst letur virkið inn skrivligt tilfar og síðani koma umboð frá Veritas at hyggja, um alt er sum tað skal. Hetta er altjóða góðkenning og Veritas kemur á árliga vitjan at vita, um góðkenningin verður hildin viðlíka.

- Tað hevur týdning, at bæði leiðsla og starvsfólk eru við uppá at hetta, og tað hava tey verið hjá okkum, sigur Áki Olsen.

ISO 9002 góðkenningin er galdandi í 3 ár fyri fyrst.

# Fyrsti várdagur í dag

*Í dag er fyrsti várdagur. Gamalt er at spáa um veðrið henda dag, ið íslendingar kalla Lyklapétur eftir appostlinum Pætur. Á føroyskum verður 22. februar róptur pætursmessa*

DAGFINN OLSEN

Í dag er fyrsti várdagur ella pætursmessa.

Gamalt var at spáa um veðrið henda dag.

- Um tað frystur fyrstu várnátt, so verður várið kalt, verður sagt, men kanska er ikki altíð so eftirfarandi, sigur veðurfrøðingurin hjá Sosialinum, Petur Skeel Jacobsen.

Petur Skeel Jacobsen sigur um veðrið í dag, at frost er ikki í luftini, men kanska fer niðurum frostmarkið norðanfyri og møguliga gerast vegirnir hálir í støðum. Hann vil tó ikki úttala seg, um hvussu várið verður.

Axel Tórgarð skrivar soleiðis í bókini Dagar og nøvn í álmanakkanum:

So mætur maður sum ápostulin Pætur hevur tveir minningardagar í álmanakkanum, annar er **pætursmessa** 22. februar, og hin er *pætursøka* tann 29. juni. Dagurin í dag verður eisini róptur *pætursstólur* og sipar til halgisøguna um, at í tí kirkju í Antiokiu, har ápostulin gjørdist biskupur, varð sett eitt hásæti til hansara, so at øll kundu hoyra hann og síggja hann. Eftir sjey ár í Antiokiu fór Pætur til Róm, og hásætið ella stólurin fylgdi honum. Pætur gjørdist fyrsti pávin. Pávarnir siga seg vera eftirmenn hansara og sita í *Pætur stóli*. Á stólinum stendur skrivað: *Ubi Petrus, ibi ecclesia* - har sum Pætur er, har er kirkjan.

Søgan um Sankta Pætur, sum stendur við dyr himmiríkis og letur upp og aftur, er komin í av evangelisku frásøgnini í Matt. 15,19: »Eg vil geva tær himmiríkisins lyklar, og tað, sum tú bindur á jørð, skal vera bundið í himli, og tað, sum tú loysir á jørð, skal vera loyst í himli«.

Pætur verður tí vanliga avmyndaður við lykli í hendi. T.d. sæst hann á einum av kirkjubøstólunum við hesum lykli. Íslendingar rópa hann Lyklapétur.

Pætur er eftir grikska orðinum *petros,* sum mekir klettur.

Hesin dagurin verður eisini róptur *fyrsti várdagur og várvinnutíð*. Nógv var spátt um veðrið á hesum degi, m.a. varð sagt, at drap úr takskegginum pætursmessudag, skuldi várið verða gott, men reyk hvørt holið fult, skuldi tað verða kalt.



*Veðurfrøðingurin hjá Sosialinum, Petur Skeel Jacobsen, sigur at frost er ikki í luftini, nú fyrsti várdagur er.*

**Mynd : Jens Kristian Vang**

# 20 lygnir

*Ungur yrkjari gevur út yrkingasavn*

DAGFINN OLSEN

Í 1999 gav Rúni Janusson út sítt fyrsta savn. Nú er hann aftur við einum yrkingasavni, ið nevnist 20 lygnir. Hann sigur í fororðinum, at fyrra savnið var dapurt og persónligt, men at hann er glaðari nú. Tó heldur hann, at nýggja savnið hevur daprar yrkingar, men við komiskum íblástri.

Sigga í Hoyvík eigur kápumyndina og tað er forlagið Drekin, ið gevur út. Savnið kostar 65 krónur.




*Rúni Janusson hevur givið út yrkingasavnið 20 lygnir. Fyrsta savn hansara kom í 1999 og nevndist tykni*

# Lærarar samráðast

*Føroya Lærarafelag og Fíggjarmálastýrið sessast í dag aftur við samráðingarborðið. Lærarafelagið hevur lýst arbeiðssteðg og bert ein góð vika er eftir, til freistin er úti*

DAGFINN OLSEN

Føroya Lærarafelag hevur lýst, at er ikki semja millum Fíggjarmálastýrið og Føroya Lærarafelag 1. mars, so fer felagið í arbeiðssteðg.

Tað tykist, sum ganga samráðingarnar millum partarnar sera strilti. Hvørgin parturin hevur viljað sagt stórvegis, men tað skilst á kunningartænastunum, sum partarnir hava á heimasíðum sínum, at tað hevur ikki gingið sum eftir ánni, tá partarnir hava hitst.

Í dag fara Føroya Lærarafelag og lønardeildin hjá Fíggjarmálastýrinum aftur til samráðingarborðið. Fundurin í dag verður helst týðandi fyri gongdina í samráðingunum, tí 1. mars nærkast alsamt. Børn og vaksin bíða við spenningi, um fyrsti arbeiðssteðgur í søgu Føroya Lærarafelags gerst veruleiki. Lærarafelagið hevur brynjað seg til arbeiðssteðg og arbeiðir við at senda kunnandi blað í hvørt hús, har greitt verður frá støðu felagsins.



# Telduskipanin steðgaði Gekkinum

*Fríggjarkvøldið vóru helst fleiri hyggjarar, sum kendu seg eitt sindur vónsviknar, tá røðin av gekkatølum brádliga steðgaði, uttan at nakar vinnari var komin fram til Rudolf*



*Fjórða spælið byrjaði eisini sum vant, men brádliga kom steðgur í. Rudolf byrjaði at tosa um, at nú hevði onkur hyggjari fingið fulla plátu, men kortini var eingin, sum var komin ígjøgnum heitu linjuna*

JÁKUP MØRK

Fríggjakvøldið í farnu viku var á mangan hátt, eins og slík kvøld vanliga eru. Nógv vóru tey, sum frøddust um enn eitt vikuskifti, har nakrir tiltrongdir frídagar vóru á skránni, og eins og vanligt, savnaðust fólk kring landið um sjónvarpstólið fyri at spæl Gekk.

Gekkurin gekk eisini, sum hann plagar at gera - í hvussu so er tey fyrstu trý spølini. Fjórða spælið byrjaði eisini sum vant, men brádliga kom steðgur í. Rudolf byrjaði at tosa um, at nú hevði onkur hyggjari fingið fulla plátu, men kortini var eingin, sum var komin ígjøgnum heitu linjuna.

Rúm tíð gekk, og tað gjørdist alt meira sjónligt, at sjónverpsverturin kendi seg alt annað enn væl, har hann fyri opnum skermi skuldi greiða hyggjarunum frá, at tað var altso ein vinnari funnin, men hesin hevði enn ikki funnið leiðina fram at telefonhorninum.

Langt um leingi varð knúturin tó loystur, og lukkutíð fyri Rudolf fekk hann endiliga onkran at práta við, so sendingin ikki gjørdist til tann beri monologur.

**Avmarkað tøl**

Úr sjónvarpinum frætta vit, at orsøkin til, at sendingin gjørdist soleiðis skikkað var, at teldan, sum stýrir spælinum, bert dregur eitt ávíst tal av tølum.

Teldan kannar samstundis, um nakar vinnari er, og tískil kundu tey í Sjónvarpinum staðfesta, at í hvussu so er ein vinnari átti at verið. Orsøkin til, at hesin ikki slapp ígjøgnum er tann, at sasmstundis sum gekkaspælararnir við fullum plátum royndu at ringja til sjónvarpið, var eitt hav av hyggjarum, sum bert væntaðu fá tøl, men sum kortini ringdu í vón um at hava fingið seinastu tølini, áðrenn teirra samrøða kom ígjøgnum. Sum skilst á lagnum, er hetta ein afturvendandi trupulleiki til hvørja sending, men higartil hevur hetta tó ongantíð verið sjónligt.

Har umframt tekur tað eisini nakað av tíð, frá tí at ein vinnari er komin ígjøgnum, til hesin sleppur at tosa við gekkavertin, tí trygdarnummar og annað skal fyrst eftirkannast, soleiðis at talan veruliga er um ein vinnara, sum sleppur í sjónvarpsstovuna.

**Gjalda fegin vinningarnar**

Tá vit spurdu, um tað hevði samband við, at fyri hvønn nýggjan vinnara, er SvF noytt at rinda 500 kr., var svarið, at hetta einki hevði við málið at gera.

Tvørturímóti eru boðini úr Sjónvarpinum, at tey vanliga draga eini fimm tøl eftir at vinnarin hevur ringt inn, og at tað tískil eru fleiri vinnarar enn neyðugt, sum fáa útgoldið tær 500 krónurnar.

Á ein hátt er hetta tó við til at stýra vinningsútgjaldingunum, tí framman undan er avgjørt, at eitt ávíst lutfall skal vera galdandi ímillum innkomnu upphæddirnar og útgoldnu vinningarnar. Hetta er ein skipan, sum eisini verður nýtt í londunum uttan um okkum, nevnliga við tí fyri eyga, at útgoldnu upphæddirnar skulu verða so nær tí ætlaða, ella ásetta, sum gjørligt.

Boðini úr Sjónvarpinum eru sostatt, at hyggjarar ikki skulu ringja inn, fyrr enn teir hava fingið fult rað ella fulla plátu, soleiðis at røttu vinnararnir sleppa ígjøgnum. Við hesum slepst eisini undan, at Rudolf einsamallur skal standa og undirhalda hyggjarunum, meðan fiskarnir í akvariinum svimja, sum um einki var hent.

# Harðliga brúk fyri kapital- og virðisbrævamarknaði

*Út frá einum vinnuligum sjónarmiði kemur tað eisini út uppá tað sama, um føroyskir arbeiðsgevarar og føroysk fakfeløg sjálvi tekna tryggingar uttanlands, ella um pengarnir fyrst verða settir í føroysk tryggingarfeløg, bankar og sparikassar, sum so flyta pengarnar av landinum. Teir fara av landinum í báðum førum, verður sagt frá Vinnuhúsinum*

ÓLAVUR Í BEITI

Seinastu tíðina hevur nógv verið at hoyrt um at tryggingar verða teknaðar uttanlands, og eisini Vinnuhúsið hevur sína viðmerking til hetta má. Í tíðindaskrivi frá Vinnuhúsinum verður sagt, at tann almenni myndugleikin hevur somuleiðis í fleiri ár handlað í stríð við lógina við tað, at ein stórur partur at tryggingunum, serliga innan sjúkrahúsverkið, eru teknaðar uttanlands.

– Til dømis hevur ein stórur fakbólkur sum sjúkrasystrarnar tryggingar uttanlands. Landsstýrismaðurin í vinnumálum hevur fingið ein trupulleika, sum ikki er so einfaldur at loysa, skrivar Vinnuhúsið.

**Útboðið**

Víðari verður sagt, at útboðið í Føroyum av tryggingum er avmarkaðar til Føroya Lívstrygging og bankar og sparikassar. Síðstnevndu tekna bara kapitaleftirlønartryggingar, og ikki ratueftirlønirtryggingar. Einasta útbjóðari av ratueftirlønartryggingum er sostatt




Føroya Lívstrygging, og stovnurin hevur sostatt eina monopol líknandi støðu.

– Monopol eru sjáldan av tí góða, og avleiðingarnir er ofta eitt ineffektivt virkið, sum livur í síni egnu verð, og prísurin á tænastum er sum oftast ov høgur. Fleiri monopol í Føroyum eru avtikin, og kapping er komin inn í vinnugreinir við tí úrsliti, at tænastan til kundarnar eru vorðin væl bíligari og betur.

– Tað er sannlíkt, at støddin av tí føroyska marknaðinum er við til at ávirka kostnaðargjøldini, og hetta kann vera partur av prísmununum á føroysum og donskum tryggingartænastum.

– Eitt annað sjónarmið í hesum høpi, og sum ikki ofta verður nevnt, er, at kapitalurin, sum verður sendur av landinum sum eftirlønar- og tryggingargjøld, kemur ikki tí føroyska samfelagnum til góðar. Peningurin fær ikki loyvi at arbeiða í Føroyum.

– Tað er tí harðliga brúk fyri einum kapital- og virðisbrævamarknaði í Føroyum, har føroyskir pengaíleggjarir kunnu seta pengar í føroysk virkir. Út frá einum vinnuligum sjónarmiði kemur tað eisini út uppá tað sama, um føroyskir arbeiðsgevarar og føroysk fakfeløg sjálvi tekna tryggingar uttanlands, ella um pengarnir fyrst verða settir í føroysk tryggingarfeløg, bankar og sparikassar, sum so flyta pengarnar av landinum. Teir fara av landinum í báðum førum.

– Sjálvandi eru krøvini til tryggingarfeløg um at spjaða sínar íløgur strong, men ein føroyskur kapital- og virðisbrævamarknaður hevði kunnað bøtt um viðurskiftini, verður sagt í tíðindaskrivinum.

## Vinnan og kapitalurin og arbeiðsmegin trívast og fjølgast í Føroyum

ÓLAVUR Í BEITI

Í morgin verður aðalorðaskifti um búskaparvøkstur og íløgur og er tað frágreiðingin hjá Finnboga Arge, vinnumálaráðharra, um gagnligastu fíggjar- og lógarkarmar til at fremja búskaparvøkstur og økja íløgurnar í Føroyum

Í frágreiðingini til aðalorðaskifti, sigur Finnbogi Arge, at í tilmælinum til vinnupolitikkin, sum fekk viðgerð á Løgtingi seinasta vár, varð sagt, at nú uppskot er sett fram um vinnupolitiskar meginreglur, ræður um, at vinnupolitiska tilgongdin steðgar ikki upp. Tvørturímóti varð boðað frá, at ætlanin var at halda fram at orða ítøkiligar málsetningar, tillaga vinnukarmarnar og eftirmeta og at orðaður verður politikkur fyri einstøku vinnugreinarnar

Og tilmæli landsstýrismansins byggir á hesi vinnupolitisku stevnumiðini: Miðað verður eftir at skapa karmar, har vinnan megnar at mennast og fylgja altjóða rákinum, tillagað, virkið regluverk til altjóða marknaðarsamstarv, vælvirkandi samskifti og samferðslu við útheimin, gransking og førleikamenning, vælútbygt undirstøðukervi, sum mennir kappingarfør lívskor um alt landið, góðar eginfíggingarskipanir og lagaligar skatta- og avgjaldsskipanir, varlig vinnulóggeving, fyrimyndarligt alment tænastustig, einfaldar, studningsveikar vinnuframaskipanir, og málsetningurin er, at vinnukarmarnir standa mát við onnur samfeløg soleiðis, at vinnan og kapitalurin eins væl og arbeiðsmegin trívast og fjølgast í Føroyum.

– Gott samsvar er millum orðaða vinnupolitikkin og innihaldið í Caragata-álitinum - Búskaparlig tillaging og framburður. Men álitið fevnir um fleiri evnir og økir, enn orðaði vinnupolitikkurin, tað er meira ítøkiligt, og kann tí síggjast sum framhald av vinnupolitikkinum. Eisini er ávíst samsvar millum samgonguskjalið og Caragata-álitið.

Og at enda sigur Finnbogi Arge í innganginum, at hann ger við hesum nøkur fá tilmæli við støði í evnum og tilmælum í Caragata- álitinum. Tey eru lítið ella einki viðgjørd í teim 5 ritunum um vinnupolitikkin, men hava avgerandi týdning fyri vinnuligan framburð og fíggjarligt sjálvbjargni, herundir útlendskar íløgur í Føroyum.